## Doyði eftir knock-out

24 ára gamli Daniel Aguillon úr Mexico andaðist mánadagin sum avleiðing av dysti í nevaleiki. Aguillon var seinasta mikudag í dysti móti landsmanni sínum, Alejandro Sanabria, og í 12. umfari varð dysturin avgjørdur eftir eitt rættiliga ógvusligt knock-out. Aguillon varð alt fyri eitt fyri koyrdur á sjúkrahúsið, men hann raknaði ongan tíð við, og mánadagin andaðist hann.



## Bilic vil ikki til Onglands

Kroatiski landsliðsvenjarin Slaven Bilic verður støðugt nevndur í sambandi við ensk feløg, og tað seinasta er, at Bilic skal verða upp á tal at gerast nýggjur venjari í Tottenham. Men sjálvur ætlar Bilic sær ongan veg. - Tað er smikrandi at verða settur í samband við feløg í Onglandi, men eg havi eitt arbeiði í Kroatia, og tað er tað einasta, sum eg hugsi um, sigur Bilic við BBC.



*EB/Streymaleikararnir vóru serstakliga fegnir, tá teir komu til Margáir í gjárkvøldið*

# Gullrúsur við Margáir

**Tað verður ofta sagt at Margáir er vøllurin í Føroyum, har mest avfall er. Í gjárkvøldið oysti niður, men tað gjørdi ongan mun hjá nógvu EB/Streyma fjepparunum og leikarunum, ið vóru komin saman til opið hús**

FÓTBÓLTUR
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*
*Myndir: Sofus D. Johannesen*

Onkur hevði á orðið at nakrar av rekettunum vóru frá 2006, gullslipsini, sum nógv hava flent at komu til sín rætt, gullølirnar vóru endiliga druknar og so framvegis. Men øll vóru á einum máli um, at hetta smakkaði betur enn nakar hevði roknað við.

Tá leikararnir komu sóu summir heilt heitir út, í mun til beint eftir dystin. Teir stillaðu seg allir út á vøllin, har »Vit eru greipuvinnarar« varð sungin fleiri ferðir. Harumframt vóru sangir sum »Vit hava vunnið gull« og »Saman í felag í senn« sungnir.

Báðir venjararnir tóku orðið og greiddu báðir frá, hvussu fegnir teir vóru um, at hava møguleikan at venja EB/Streym. Fleiri av fjepparunum tóku orðið, og stadionspeakarin var sum hamskiftur frá dystinum ímóti B36 fyri góðari viku síðani.

Summi flentu eisini at, at tey høvdu bíðað alt lívið eftir hesum, meðan Sorin Anghel, ið hevur verið ein av ímyndunum av framgongdini hjá EB/Streymi ikki ordiliga sá út til at skilja, at liðið endiliga hevur rokkið á mál.

Trúføstu bindiklubbakonurnar hjá EB/Streymi hava nokk heldur ikki sungið harðari og betri í alt ár, men tær vandu eisini óført meðan dysturin á Skála var.

Alt í alt ein løta við nógvum gullrúsi og nógvari gleði.

Nú bíða EB/Streymafólk bert eftir at vinda burturúr HB leygardagin, og harvið sláa seymin tann eyka millimeturin.



*Venjararnir báðir søgdu nøkur orð, men lovaðu samstundis, at røðurnar verða longri og betri leygardagin*



*Pól Andreasen tók orðið. Lítið er at ivast í, at hansara bláa og svarta hjarta hevði tað gott*



*Enn er føroyameistarasteypið ikki komið í hús, tað á myndini er frá dreingjaliðskapping, men nú bíðar Rólant Højsted, formaður í EB/Streymi, bara eftir, at ordiliga steypið kemur*